# Kvinnukvæði

*Lag: Ormurin langi*



1
Vilja tit hoyra kvæði mítt,
vilja tit orðum trúgva?
Um kvinnurnar á Flatlondum,
hagar skal ríman snúgva.

*Stev*
Glymur dansur í høll,
dans sláið ring,
glaðar ríða genturnar
á kvinnuting.

2
Sendu boð í Skeggjanum,
hann kemur út so víða:
Allar tit, sum heima sita,
byrjið kvinnustríðið.

3
Konufólk í hópatali
ganga saman í ráð,
Hvussu tær skulu kúganina
skjótt av døgum fá.

4
Genturnar lata felag stovna
her á sløttum landi,
Føroya kvinnur vilja ikki
longur vera í bandi.

5
Hittust vit í Rantzausgøtu
fullar av arbeiðshuga
Til at gera kvinnufylking
og vita hvat vit duga.

6
Bólkar vóru skipaðir
hvør við sínum evni,
granska og kjakast aftur og fram
og seta so hinum stevnu.

7
Hvør er tað, sum fær hjólini
á flakavirkjum at mala?
Kvinnurnar, sum leypa til,
tá stjórar á tær gala.

8
Tær skera og pakka út á nátt,
har hjálpir eingin bøn.
Lønin lág er tað tey kalla
konufólkaløn.

9
Hví eru kvinnur undirløntar
á arbeiðsplássum sínum?
Fakfeløg okkara styrkjast mugu
at standa í lønarstríðnum.

10
Um møður og ommur okkara
eingin søga er skrivað.
Hvar eru allar kvinnurnar,
í Føroyum hava livað?

11
Hví flyta kvinnur av landinum?
Frá hvørjum munnu tær flýggja?
Fara tær niður at útbúgva seg
(ella niður at fríggja?)

12
Í Føroyum er einki arbeiðsloysi,
vísir menn fortelja,
men hvat hava ungu genturnar
av størvum í at velja?

13
Hvar munnu ungar gentur fara,
tá skúlin lokin er?
Í Føroyum lítið er at læra,
til Danmarkar hon fer.

14
Hittast vit í barnabólki,
ganga saman í ráð,
hvussu vit skulu børnunum
betri korini fá.

15
Mamma best hjá børnum er,
sigur eitt gamalt orð.
Men vóru fleiri um byrðuna,
batnaðu barnakor.

16
Kapitalisman harðar kostir setir
og ikki mjúkar,
børnini ert tú einsamøll um,
títt arbeiði má rúka.

17
Kapitalistisk eyðræning
foreldur frá børnum stjelur,
tey verða varaarbeiðskraft,
tú brúkarar upp elur.

18
Tey ungu eru óupplýst
hvønn annan um at fara,
upplýsing vit breiða út
- betur fyrivarin.

19
Nú skal lætta ljóði av,
eg kvøði ei longur á sinni,
nú skal taka upp annan tátt,
dreingir, leggið í minni.

20
Av egnum lívi dømi taka,
læra hvør av øðrum.
Privatlívið politiskt er,
tað sannast í øllum førum.

*Stev:*
Glymur dansur í høll,
dans sláið ring,
glaðar ríða genturnar
á kvinnuting.

# Tá valdið verður hótt koma hógvarnir fram

HEIDI PETERSEN
løgtingskvinna



## Altjóða kvinnudagur 8. mars. Kvinnudagur kring allan heim

Á altjóða kvinnudegnum 8. mars býðst høvi at varpa ljós á viðurskifti sum liggja kvinnum á hjarta, hvørji tiltøk skulu til fyri at bøta um javnstøðuna millum kynini, so at kvinnur og menn hava javnbjóðis politiskt og fíggjarligt vald í heiminum, hvat er til ráða at taka fyri at steðga handli við kvinnum og børnum, hvussu kunnu menninir gerast ein partur av javnstøðu arbeiðinum, og nógvir aðrir viðkomandi spurningar.

Altjóða kvinnudagurin var settur á stovn í 1910 við tí endamálið at varpa ljós á arbeiði fyri rættindum hjá kvinnunum. Tað vóru millum aðrar kendu sosialista kvinnurnar Clara Zetkin og Rosa Luxemburg sum vóru slóðbrótarar í hesum arbeiði. Hetta hendi í tí nú so kenda Fólksins Húsi á Jagtvegi 69 í Keypmannahavn, eitt sindur av lagnunnar speisemi kundi man sagt, at húsið sum var karmur um stovnsetanina av altjóða kvinnudegnum, nú liggur í sandasorli, men tí betur, enn livir arbeiði fyri javnstøðu og hevur hetta arbeiði breitt seg kring allan heim.

Evnini kvinnurnar kring heimin taka til viðgerðar 8. mars eru sera ymisk. Í Chile varpa kvinnurnar ljós á arbeiði fyri javnstøðu við at býta út blómur til menninar, við blómunum er fest kort við áskriftini: saman berjast vit fyri kvinnurættindum.

Í Kina er tiltak í Peking har peningur verður savnaður til foreldraleys børn. Peningurin skal nýtast til útgerð, rakstur og trygg spæliplláss á barnaheimum hjá BICCO, sum er internationalur felagsskapur fyri foreldraleys børn í Peking. Tey flestu av hesum børnum eru gentur.

Í Írlandi varpa kvinnurnar ljós á hvussu heimsins ríkidømi verður býtt og hvussu misjavnin í ríkidøminum verulig ávirkar støðuna hjá kvinnum, monnum og børnum í heiminum.

Í Danmark setir eitt av tiltøkunum 8. mars ljóskastarin á handilin við kvinnum og børnum í Evropa, og krevja at kvinnur ið eru innfluttar til prostitutión í Danmark, skulu hava rætt til fast uppihald í landinum. Handil við menniskjum, er triði stórsti ólógligi handil, sum fer fram í heiminum eftir ólógligum vápna- og narkotikahandli. Bara í Evropa vera innførd 500.000 kvinnur og børn til sex ídnaðin og koma hesi úr Eysturevropa, Thailandi, Suðuramerikonskum og Afrikonskum londum.

At enda vinna vit sigur, kvinnur og menn.

At Føroya Løgting 20. oktobur 2005 samtykti at setta nevnd at arbeiða fyri øktum leikluti í politikki, kann sigast at vera eitt søguligt frambrot. Uppskotið fekk dyggan stuðul í løgtinginum og var samtykt við 28 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

Hetta stig vísir at eisini politiska skipanin hevur ásannað at neyðug er við serligum tiltøkum til tess at bøta um javnstøðuna í Føroyum. Hetta vísir at tann hugburðsbroyting sum skal til fyri at broyta verandi støðu, frá at hava eitt gapandi demokratiskt undirskot í samfelagnum, til eitt samfelag við javnstøðu millum kvinnur og menn, er á veg.

Frá at hava eitt undirútvikla demokrati, har valdi bert situr á fáum hondum, eru vit á veg til eitt veruligt demokrati, har valdi er javnt býtt millum kynini.

Hetta er ein long og torfør tilgongd, sum vit øll eiga at vera til reiðar at taka. Demokratia við nógvum góðum, neyðugum og fjølbroyttum tiltøkum, Javnstøðunevndin á øllum teim pallum sum hon hevur at virka á, løgtingsfólk og bygdarráðslimir í teimum álitissessum sum teimum eru tillutaðir, vinnulívsfólk og almennir stovnar, øll eiga í felag at seta sær sum mál at í Føroyum skal full javnstøða valda.

Hetta merkir at bæði kynini eru javnt umboðaði bæði har politisku avgerðirnar skulu takast og í vinnulívinum í Føroyum. Eitt samfelag við so lítlum fólkatalið sum tí føroyska, hevur á ongan hátt ráð til ikki at nýta helvtina av tí góða fólkatilfeinginum vit hava í politikki og í vinnulívinum.

Tað er einans við hesi felags niðurstøða vit kunnu byggja land frameftir og á tann hátt lyfta alt Føroyska samfelagið upp til eitt veruligt nútímans demokrati. Fyri at skunda undir hesa byrjaðu tilgongd, verður eftir míni fatan neyðugt við nøkrum serligum átøkum, eitt av teimum er at tryggja eina kyninum, kvinnum ella monnum minst 30 % av umboðanini á Føroya Løgtingi. Hetta vildi í dag merkt at kvinnurnar skjótari fingu sín demokratiska rætt til ávirkan í samfelagnum, men hetta hevði samstundis verið við til at tryggja synum okkara rættin til ávirkan í framtíðar samfelagnum.

So sjálvt um hógvarnir hjá nøkrum valdshavarum í dag stinga grefligt í eyguni, og teir í krampaherindum geyla ímóti tí tilgongd teir sjálvir hava verið við til at samtykt, og teir síggja at ein hugburðsbroyting er á veg, og vit eru ávegis einum demokratiskum samfelagið har javnstøða valdar á øllum økjum, so eiga vit ikki at gevast á hondum, men bretta upp um armar og halda áfram á leiðini við góðum treysti, tí at enda vinna vit sigur, kvinnur og menn.